# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/16 - 23. oktober 2024 16:00-18:00

### Skrá:

1. Bygnaðurin hjá skúlanum
2. Uppstillingarfundur
3. Formansfrágreiðing
4. Ymiskt
5. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Erla, Snorri, Sjúrður & Derhard |
| Forfall: | Bjørg, Súsanna |
| Gestir: | eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad. 1
**Bygnaðurin hjá Skúlanum**
Skriv viðfest sum fylgiskjal 1 til støðutakan at senda kommununi.

Ad. 2
**Uppstillingarfundur**
Lýsing viðfest sum fylgiskjal 2

Ad. 3
**Formansfrágreiðing**
Viðfest sum fylgiskjal 3

Ad. 4
**Ymiskt**
A: Vitlíki
Skúlin fer í várhálvuni undir at menna førleikar hjá lærarum á 3 skeiðum.
Leiðslan ynskir heimild til at dagføra KT-politikin og læruætlanina hjá skúlanum í hesum sambandi.
Skúlastýrið samtykkir at leiðslan setir ein bólk at arbeiða við at orða ein nýggjan kt-politikk og nýggja læruætlan har vitlíki er partur av politikkinum.
Skúlastýrið ynskir at fáa ein dagførdan kt-politikk og læruætlan til støðutakan og viðmerkingar áðrenn summarsteðgin.

B: Støðumet í arbeiðslag
Nýta metini 1-5 í
Seta í verk frá dd til páskir. Tá tað verður eftirmett.

Ad. 5
**Áseta næsta fund**
Hósdagin 5 desember 2024. kl 16-18

Fylgiskjal 1

21. oktobur 2024

Skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum
Derhard Jógvansson, formaður
Hans Andriasar gøta 10
100 Tórshavn

**Tórshavnar kommuna**
Mentamáladeildin
Vaglið 1
100 Tórshavn

# Hádeild í Skúlanum á Fløtum

Vísandi til skriv dagfest 24/3-2024 til skúlaleiðsluna, hevur skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum hesa umsókn og viðmerkingar í hesum sambandi.

**Umsókn frá skúlastýrinum:**

a.

at mannagongdin fyri upptøku í hádeild, ið skúlin hevur nýtt, aftur verður heimilað

b.

um hetta ikki letur seg gera, at kommunan staðfestir at sama mannagongd, ið verður nýtt av øllum skúlum um flyting millum skúlar, so er galdandi.

**Viðmerkingar til umsóknina og skrivið dagfest 24/3-2024**

Skúlastýrið hevur á trimum fundum í 2024 viðgjørt málið um skipan av hádeild í rásir. Herundir:

- bygnaðin so sum hann er samtyktur av TK 24/2-2022,
- okkara í skúlastýrinum samtykta skipan innanhýsis, ið byggir á býráðssamtyktina,
- royndarverkætlanina undir BUMR fyri Skúlan á Fløtum 2023-2027
- framhaldandi skipan av Skúlanum á Fløtum.

Okkara niðurstøða er, at skúlabygnaðurin fyri Skúlan á Fløtum greitt sigur, at skúlin er trýsporaður í forskúla, grund- og miðdeild, meðan hann er fýrasporaður í hádeild.

Tískil er tað ikki brot á bygnaðin, at skúlin tekur ímóti næmingum í 7.fl og býður avlopspláss. Skúlin er staðfestur móttøkuskúli í 7.fl, tí er hetta heldur ikki brot á bygnaðin.
Skipan av undirvísingini er ikki partur av bygnaðinum, tí er tað ikki brot á bygnaðin, at skúlin skipar rásir í hádeild.

Kommunan hevur ongantíð biðið um ella fingið samtykt rásir sum samtarv millum skúlar, sum býráðsfundurin annars samtykti. Tí er hetta heldur ikki brot á bygnaðin.

Skúlin er skipaður sum lýst í brævinum frá skúlanum 24/11-2021.

- Við rásum í hádeild.
- Serflokkum í tveimum deildum. Ein í hádeild, ið er samstarv við Gulaskúla og ein í miðdeild, ið førleikastovan samskipar.
- Serflokkur fyri grunddeil er tó ikki settur á stovn enn, tí eyka flokkurin, sum foreldur trýstu komununa at góðtaka uttanum bygnaðin fyri Skúlan á Fløtum fyri trimum árum síðan, er tí stovuni.

Hetta vísir, at skúlin hevur skipað sín bygnað, sítt innihald og síni langtíðarviðurskifti eftir leisti, ið varð lýstur fyri kommununi, áðrenn hann varð settur í verk og langt frammanundan royndarvekætlanin var partur av málinum.

Skúlin hevur hildið seg til tað, ið skúlin hevur fráboðað.
Skúlin hevur hildið seg til innskrivingarmannagongdir, ið eru gjørdar saman við mentamáladeildini hjá kommununi.
Skúlin er námsfrøðiliga og fyrisitingarliga væl rikin.
Skúlin er av mettur sum flaggskipið í skúlaverkinum. Ikki einans av bygninginum. Men av innihaldinum og tí vit hava víst í verki.

Úrslitini mett í próvtølum hjá næmingum tala fyri seg og vísa at skúlin hevur eitt dygdartilboð.
Trivnaðarkanningin hjá BUMR vísir greitt, at næmingar trívast væl í Skúlanum á Fløtum.
Royndarverkætlanin hevur ikki broytt bygnaðin nakað við tali av flokkum ella sporum.
Rásaskipanin rúmast innanfyri bygnaðin, so sum hann er samtyktur.
Men tað er rætt, sum víst verður á í skrivinum, at royndarverkætlanin ávirkar tilboðið til næmingin. Men tað er ikki bygnaðin, so sum kommunan grundgevur fyri. Tað er lærugreinin týskt, sum er ávirkað.

Næmingar kunnu velja týskt í 8. og 9.fl á øðrum skúlum og skulu hava lærugreinina bæði árini. Hjá okkum hava tey smb royndarverkætlanini týskt frá 7.fl. til 9.fl. Hjá okkum er treytin fyri lærugreinina tí, at tey skulu hava hana øll trý árini. Tí kunnu næmignar, sum flyta til okkara í 8.fl ikki velja týskt.
Tað merkir, at teir næmingarnir, sum hava gingið í 7.fl á øðrum skúla, ikki kunnu velja týskt í okkara 8.fl. Harvið kunnu tey ikki vera upptikin á hugbreyt í miðnámi. Hetta er ein bági fyri næmingin, men ikki brot á bygnaðin.

Vit skulu her eisini viðmerkja, at tað er munur á, hvussu hádeild og framhaldsdeild verða skilmarkað. Í argumentatiónini nýta vit javnt og samt orðið hádeild. Í øllum okkara samskifti skilja vit hádeild sum 7.-9.fl. Í summum skjølum og í øðrum samkifti - serliga millum aðrar

skúlar og kommununa - verður grindgivið fyri, at tað stendur framhaldsdeild, ið merkir 8.-9.fl og tí skulu vit ikki hava hildið okkum til samtyktirnar.
Til hetta er at siga, at framhaldsdeild er gamalt hugtak og stavar úr í fólkaskúlalógini frá 1997. Framhaldsdeild fevnir um 8.-10.fl og sipar til tíðina, tá vit høvdu fólkaskúlaprógv og víðkað fólkaskúlaprógv. Hetta er leivd frá tíðini, tá skúlin var krav til og við 7.fl, og eftir hetta var eitt val ella framhald. Tískil framhaldsdeild.
Hetta er langt síðan farin í gerandisdegnum í skúlunum. Tórshavnar kommuna hevur samtykt at samla allan 10.fl í NámX í Eysturskúlanum, sum er tað veruliga framhaldstilboðið sæð í dagsins skúla. Hetta er gott átak og námsrøðiliga tað rætta at gera. Og sjálvandi tað, hóast lógarverkið ikki er dagført í orðum og hugtøkum. Vit fara ikki at grundgeva fyri at fáa 10.fl aftur við jørðildi í orðinum framhaldsdeild.

Nýggju skipanina við hádeild skilmarkað sum 7.-9.fl síggja vit í námsætlanum, lærubókaheildum, lærugreinabýti og próvtøkum og øllum sum lýsir dagsins skúla, ið leggur upp til at 7.-9.fl er skipaður í eina deild. Hádeild.

Tí undrar tað okkum at hetta skal vera lutur av grundarlagnum undir støðutakanini.

Skúlin hevur í arbeiðsbólki undir kommununi, ið varð settur 6. mai 2021 eisini ført hesi sjónarmið fram.

Skúlin hevur í samskifti við kommununa eisini greitt sagt frá okkara skipan. Sí m.a. skrivið, ið er nevnt omanfyri dagfest 24/11-2021. Hetta skriv lýsir skúlabygnaðin, har skúlin á 5 síðum lýsir og advokrear fyri einum samahangandi hádeildartilboð frá 7-9.fl við ítróttarrás og almannarás. Hetta var fyri okkum høvuðsgrundgeving fyri at broyta bygnaðin. Okkara støða var antin at taka ímóti næmingum frá Sankta Frans skúla í 7.fl ella als ikki taka ímóti. Kommunan valdi tá, at vit ikki skuldu taka ímóti Sankta Frans næmingum tí tey skuldu ganga í Sankta Frans skúla í 7.fl. Tá blivu vit móttøkuskúli fyri Velbastaðar skúla í 7.fl. Júst sum vit ynsktu og grundgóvu fyri.

Tí kom tað ávart á okkum, at kommunan setti eina forðing fyri skipan av hádeild sum samanhangandi tilboð við grundgevingum um hatta ikki er í samsvar við bygnaðin og skapti órógv á øðrum skúlum.

Vit skilja ikki hví kommunan skal samtykkja innihaldið í undirvísingini í Skúlanum á Fløtum og nokta upptøku í almannarás generelt øll árini og nokta skipan av rásum generelt í 7. fl galdandi serstakt fyri Skúlan á Fløtum. Hetta er samstundis sum kommunan ikki leggur seg út í innihaldið á hinum skúlunum í Havnini, ið m.a. bjóða førleikaflokkar, ítróttartilboð, heilsu og kostdag, science rás, orblindaflokk og onnur tilboð.

Um trupulleikin er, at vit lýsa við upptøkuni á okkara egnu heimasíðu. So kunnu vit steðga tí og fylgja vanligu mannagongdini við *skifti millum skúlar* eisini nevnd mannagongd b fyrst í hesum brævinum.

Um trupulleikin er, at upptøkan liggur í januar, so kunnu vit flyta upptøkuna til apríl/mai. Men hetta ynsktu hinir skúlarnir í Havn ikki, tá okkara mannagongd bleiv orðað saman við Mentamáladeildini undir leiðslu av Sigurði Ó Vang.

Um trupulleikin er, at næmingum dámar so væl okkara tilboð, at tey vilja flyta til okkara, heldur enn at halda fram í sínum skúla, meta vit, at tað eru hinir skúlarnir, sum mugu dagføra síni tilboð, so næmingarnir vilja tað í staðin. Tað hava m.a. Eystursskúlin við science rás og Skúlin við Løgmannabreyt við fótbóltstilboði gjørt. Eingin næmingur er komin av Løgmannabreyt í ár og munandi færri úr Eysturskúlanum hóast pláss var fyri teimum.

Tí er tað har, ið kommunan eigur at seta sjóneykuna og loysa órógvið hjá teimum skúlunum innanveggja, so næmingarnir ynskja at halda fram har heldur enn at skifta.

Og at grundgeva fyri at skiftini eru orsaka av at bygningurin há okkum er nýggjur; sum bleiv nevnt á skúlastjórafundi í oktober 2024, heldur eiheldur mát. Tí næmingar fluttu eisini í Skúlan á Fløtum í rásatilboðið, tá vit ikki vóru í nýggja bygninginum.

So eitt samt skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum ynskir saman við leiðsluni og starvsfólkahópinum í hádeild, at halda fast í skipanini, sum bleiv stungin út í kortið veturin 2021 við upptøku í januar heldur enn leypandi tilmelding eftir almennu mannagongdini um skifti millum skúlar.

Skúlastýrið heldur fast í verandi skipan av hádeild við rásum frá og við 7.fl.

**Samanumtøka**
Næmingagrundarlagið fyri Velbastaðar skúla og Skúlan á Fløtum samsvarar væl við bygnaðin við 3 sporum í grund- og miðdeild og 4 sporum í hádeild. Men hetta merkir eisini, at tað ikki verða 4 fullir flokkar. Tí eru avlopspláss.
Skúlin er móttøkuskúli í 7.fl so umskpinan av flokkum liggur náttúrliga tá. Heldur enn í 7.fl og aftur í 8.fl.
Innihaldið í undirvísingini er ikki partur av bygnaðinum. Tí kann tað ikki vera brot á bygnaðin.
Skúlin hevur greitt og skilligt sagt frá sínum ætlanum í góaðri tíð og sett hesar í verk sum lýst.
Tær eru innanfyri bygnaðin við nevndu sporum í móttøku og tískil heldur ikki brot á hann.
Royndarverkætlanin 2023-2027 er innanfyri bygnaðin, so sum hann er samtyktur. Tað einasta royndarverætlanin broytir er valfakið týskt, ið ikki kann veljast at næmingum, ið ikki hava gingið í Skúlanum á Fløtum í 7.fl. Hetta er ikki brot á bygnaðin, men ein bági fyri einstaka næmingin.

Tí spyrja vit um:
a.
at mannagongdin fyri upptøku í hádeild, ið skúlin hevur nýtt, aftur verður heimilað
b.
um hetta ikki letur seg gera, at kommunan staðfestir at sama mannagongd, ið verður nýtt av øllum skúlum um flyting millum skúlar, so er galdandi.

**Ískoyti**
Í løtuni standa 6 næmingar á bíðilista til verandi 6.fl (7.fl 25/26).
Hetta eru næmingar, ið ynskja at koma í okkara hádeild úr øðrum skúlum í Havn. Ein í almannarás og fimm í ítróttarrás. Harumframt hava vit fingið fleiri munnligar spurningar um, nær vit fara at skipa fyri upptøku í hádeild. Mest ítróttarrás og men eisini lutvíst almannarás.
Tí er týdningarmikið fyri okkum at vita um tað er loysn a. ella loysn b., ið við skulu nýta.
Higartil hava vit svara at tey verða skrivað upp eftir mannagongd b. almennu mannagongdini galdandi fyri øll. Hetta hava vit eisini lýst á https://saf.fo/rasir-i-hadeild so einki skal vera ógreitt.

Tórshavn 21/10-2024

Regin Marnersson
Skúlastjóri

Derhard Jógvansson
Skúlastýrisformaður

Skúlin á Fløtum

Fylgiskjal 2

## Uppstillingarfundur til skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum

Hvat skal komandi skúlastýrið á Fløtum arbeiða við, og hvør skal manna tað? Tað eru tveir sera aktuellir spurningar, tí;

**Mikudagin 23/10 frá kl 17 til kl 18 verður uppstillingarfundur til skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum.**

Uppstillingarfundurin byrjar kl 17 við stuttari formansfrágreiðing, har fráfarandi formaðurin í skúlastýrinum Derhard Jógvansson tekur saman um seinastu fýra árini við sitandi skúlastýri.

Eftir formansfrágreiðingina koma tey trý,

**Andrea Heindriksdóttir**, ið hevur sitið í skúlastýrinum fyri Kommunuskúlan undan samanleggingini.

**Magnus Tausen**, ið sat í skúlastýrinum fyri Venjingarskúlan, tá skúlarnir blivu lagdir saman og

**Derhard Jógvansson**, ið hevur sitið í skúlastýrinum fyri Skúlan á Fløtum síðan skúlarnir hava verið lagdir saman.

Tey fara fyrst stutt at hugleiða og kjakast um skúlastýrisarbeiði, tá tað gongur væl, og tá tað gongur minni væl, um foreldrademokrati gjøgnum skúlastýrisarbeiðið, og hví tað er so týdnigarmikið at hava eitt vælvirkandi skúlastýri.
Regin Marnersson, skúlastjóri verður orðstýrari.

Á uppstilingarfundinum verður høvið at skjóta upp evni til komandi skúlastýrið at arbeiða við. Tað verður høvið at skjóta upp valevni ella at koma á uppstiliingarlistan, um ynski er til tess. Tað ber eisini til á fundinum at kanna, um bæði foreldrini hava valrætt til skúlastýrið, tí hjá nógvum foreldrum er tað bara annar, ið hevur valrætt.

Øll eru vælkomin og vónandi møta fleiri umboð pr flokk.

Vegna valnevndina

Regin Marnersson, skúlastjóri og formaður í valnevndini
Derhard Jógvansson, frafarandi skúlastýriformaður og foreldraumboð í valnevndini
Fríða J Sivertsen, skrivari og komunalt umboð í valnevndini

Fylgiskjal 3

## Formansfrágreiðing fyri 2024

Foreldraumboðini í skúlastýrinum eru Erla Bech Nolsøe, Snorri Patursson og undirritaði. Kommunustýrisumboðini eru Bjørg Dam og Súsanna Olsen. Sjúrður Juul Ravnsfjall er starvsfólkaumboð og Regin Marnersson, skúlastjóri, er skrivari.

Nærum fýra ár eru gingin, síðani nýggi Skúlin á Fløtum varð tikin í nýtslu, og kunnu vit óivað siga, at gerandisdagurin í skúlanum hevur fingið eina fasta legu fyri bæði starvsfólk, næmingar og foreldur. Sum vera man hava nakrar tillagingar verið framdar bæði innihaldsliga og viðvíkjandi kørmunum hesi fýra árini.

### Tillagað tímatalva

Við skúlaársbyrjan í august 2023 var farin undir eina verkætlan, sum skuldi vara í trý ár. Verkætlanin inniber millum annað eitt tillagað lærugreinabýti og ein styttan skúladag, so eingin næmingur er í skúla meiri enn í mesta lagi seks tímar um dagin. Hetta, fyri at fáa betri dygd í undirvísingina og harvið betri úrtøku fyri næmingin. Sum heild kann sigast, at verkætlanin hevur eydnast væl. Sigast má, at Skúlin á Fløtum veruliga livir upp til sína visión at vera og gera meira enn tað vanliga.

### Guliskúli

Næmingatalið í Gulaskúla økist hvørt ár. Tí er tað gleðiligt, at umstøðurnar í skúlanum, sum húsast í gamla Argja skúla, eru vorðnar so góðar. Karmarnir hava fingið ábøtur, so teir eru betri, og eru við til at skapa betri trivnað ímillum næmingar og starvsfólk. Skúlastýrið fekk eina rundferð í skúlanum og kunning um, hvussu gerandisdagurin í tí dagliga virkar væl, til gagns fyri bæði næmingar, foreldur og starvsfólk. Tilboðið, sum áður varð nevnt 4-10 tilboðið, hevur heitið Guliskúli. Næmingarnir og starvsfólkini trívast væl í góðu og tryggu umstøðunum. Tað er at gleðast um.

### Kantinan

Vit mugu staðfesta, at ætlanin um at opna køk skúlans, so næmingar kundu keypa sær heilsugóðan mat á skúlanum, ikki hevur eydnast hesi fýra árini. Arbeitt hevur verið við ymiskum loysnum og hevur evnið nærum verið uppi at vent á hvørjum skúlastýrisfundi. Men enn er eingin loysn av hóma, hóast tað til tíðir hevur sæð lovandi út. Vit vóna øll, at tað ikki gongur ov long tíð, áðrenn bæði næmingar og starvsfólk kunnu fáa gleði av einari vælvirkandi opnari kantinu. Avgjørt nakað, komandi skúlastýrið kann arbeiða víðari við.

### Tvær stovur afturat

Stutt eftir at gerandisdagurin í Skúlanum á Fløtum so smátt var byrjaður fyri fýra árum síðani, mátti staðfestast, at tørvur var á fleiri stovum. Fyrilestrasalurin varð tí gjørdur um til tvær skúlastovur. Grundin til hetta var fyri tað fyrsta at hýsa flokkunum, sum fylgjandi árini vóru fleiri, enn skúlin upprunaliga er bygdur til. Skúlin er ein trý sporaður skúli frá forskúla til og við sjeynda flokk, og ein fimm sporaður skúli í áttanda og níggjunda.
Orsakað av at skúlin undanfarnu árini hevur tikið ein eyka flokk inn í grunddeild og tríggjar eyka flokkar inn í hádeild, er tí tørvur á tveimum eyka stovum. Tær fingu vit, tá fyrilestrasalurin varð gjørdur um.
Spyrjast kann, um tað ikki verður ein missur, nú eingin fyrilestrasalur longur er. Til tað kann svarast – og er tað seinna grundin til, at hann varð gjørdur um til tvær stovur – at fyrilestrasalurin

í veruleikanum ikki var so væl egnaður til undirvísing, sum ætlað var. Tað er við øðrum orðum ein vinningur at hava fingið tvær stovur afturat. Bæði fyri næmingarnar í øllum aldursbólkunum og fyri starvsfólkini.

## Felags foreldrafundurin

Árliga verður skipað fyri einum felags foreldrafundi. Tað er hesin fundurin, vit nú eru savnað til. Samstundis er hetta uppstillingarfundur til komandi skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum. Áðrenn høvið verður at skjóta upp evni til komandi skúlastýrið at arbeiða við og valevni til vallistan, verður orðaskifti ímillum Andreu Heindriksdóttir, fyrrverandi forkvinna í skúlastýrinum á Kommunuskúlanum, Magnus Tausen, fyrrverandi formann í skúlastýrinum á Venjingarskúlanum, og undirritaða.

Endaligt vil eg fegin siga, at tað hevur verið gleðiligt, læruríkt, gevandi og viðhvørt eitt sindur avbjóðandi at hava fingið loyvi at tæna sum foreldraumboð í skúlastýrinum. Skúlin á Fløtum er ein einastandandi skúli við framúr góðum kørmum og sera dugnaligum starvsfólkahópi. Fyri mítt egna viðkomandi vil eg siga, at tað hevur verið við eyðmýkt, at eg var valdur inn í skúlastýrið. Hetta kann eg óivað siga vegna Erlu og Snorra eisini.

Við hesum orðum vil eg takka fyri og bjóða Andreu og Magnusi vælkomnum.

Takk fyri.

Derhard Jógvansson,
forfólk í skúlastýrinum fyri Skúlan á Fløtum
22. oktobur 2024

## Mannagongd

- Regin: Bjóðar vælkomin
- Derhard: Presentera skúlastýrið

  Foreldraumboð: Erla Bech Nolsøe, Snorri Patursson, Derhard Jógvansson
  Kommunustýrisumboð: Bjørg Dam, Súsanna Olsen
  Starvsfólkaumboð: Sjúrður Juul Ravnsfjall
  Skrivari: Regin Marnersson
- Derhard: Formansfrágreiðing
- Snorri Patursson: Fyrilestur
- Regin Marnersson: Fyrilestur
- Derhard: Takka fyri